sernám

NÁMSFRØÐILIG OG SÁLARFRØÐILIG RÁÐGEVING

# Sernámsfrøðiligur ráðgevi og taliráðgevi til Sernám

**Sernámsfrøðiligur ráðgevi**

Søkt verður eftir sernámsfrøðiligum ráðgeva til farloyvisstarv á 35 tímar at byrja 1. november 2020 ella skjótast eftir tað. Setanin er til og við 31.oktober 2021.

Arbeiðsøkið hjá Sernámi er um alt landið, og hetta starvið er í løtuni knýtt til toymi, sum hevur Tórshavn og Sandoynna.

**Vit bjóða:**

- Eitt áhugavert og avbjóðandi starv við fjølbroyttum uppgávum
- Eitt fakligt/tvørfakligt og sernámsfrøðiligt mennandi umhvørvi
- Førleikamenning eftir umstøðum og tørvi

**Arbeiðsøkið er stórt og fjølbroytt við nógvum samskifti við starvsfólk, leiðslur, avvarðandi og aðrar viðkomandi stovnar, og tí vænta vit, at umsøkjari:**

- Hevur førleika at arbeiða við sernámsfrøðiligum avbjóðingum
- Hevur áhuga fyri avbjóðingum, og er fúsur at royna nýggjar leiðir
- Dugir væl at skapa álit
- Dugir at arbeiða sjálvstøðugt, og hevur góð samstarvsevni
- Trívist við at samstarva við skiftandi fakbólkar

**Høvuðsuppgávur í starvinum eru:**

- At veita ráðgeving og vegleiðing til starvsfólk í skúlum og dagstovnum og til foreldur, sum eru um børn í serligum avbjóðingum
- At samskipa átøk við støði í niðurstøðum og tilmælum frá Sernámi og øðrum stovnum
- At eygleiða og ráðgeva í mun til skipan av sernámsfrøðiligum átøkum í skúlum og dagstovnum
- At vegleiða skúlum og stovnum at gera einstaklinga læru- og menningarætlanir
- At samstarva tvørgreinaligt innanhýsis og uttanhýsis

**Førleikakrøv:**

Útbúgving sum lærari ella námsfrøðingur við eftirútbúgving/hægri útbúgving innan sernámsfrøði. Royndir innan sernámsfrøðiliga økið er ein fyrimunur, men ikki ein treyt. Fyrimun hava umsøkjarar við útbúgving ella royndum innan skúlaverkið.

SERNÁM

Á FRÆLSINUM 32 . POSTRÚM 2036 . FO-110 TÓRSHAVN . TLF 360200 . FAX 310196 . SERNAM@SERNAM.FO . WWW.SERNAM.FO

**Setanartreytir til starvið:**

Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Margreth Olsen, stjóra, á telefon 360 200 ella í teldubrævi til margreth@sernam.fo.

**Umsóknarfreist:**

Umsóknir við avriti av prógvum, CV og øðrum viðkomandi skjølum, skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi sunnudagin 18. oktober 2018 og skulu sendast til:

**Sernám**
**á Frælsinum**
**Postboks 2036**
**FO-110 Tórshavn**
**ella sum teldubræv til** sernam@sernam.fo

Sernám veitir sernámsfrøðiliga ráðgeving, vegleiðing og stuðul, soleiðis at børn og ung (0-18 ár) kunnu styrkjast í menningini, sum umfatar sosiala, kropsliga, persónliga, málsliga og kognitiva menning.
Í løtuni er Sernám í eini broytingartilgongd, og tann, ið settur verður, má vera sinnaður at luttaka virkin í hesi tilgongd umframt tola broytingar í starvinum.

**Taliráðgevi til Sernám**

Søkt verður eftir einum taliráðgeva til barsilsfarloyvissstarv fulla tíð at byrja 1. november 2020 ella skjótast eftir tað.

Arbeiðsøkið hjá Sernámi er um alt landið, og hetta starvið er í løtuni knýtt til toymi, sum hevur Tórshavn og Sandoynna.

**Vit bjóða:**

- Eitt áhugavert og avbjóðandi starv við fjølbroyttum uppgávum
- Eitt fakligt/tvørfakligt og sernámsfrøðiligt mennandi umhvørvi
- Førleikamenning eftir umstøðum og tørvi

**Arbeiðsøkið er stórt og fjølbroytt við nógvum samskifti við starvsfólk, leiðslur, avvarðandi og aðrar viðkomandi stovnar, og tí vænta vit, at umsøkjari:**

- Hevur førleika at arbeiða við sernámsfrøðiligum avbjóðingum

- Hevur áhuga fyri avbjóðingum, og er fúsur at royna nýggjar leiðir
- Dugir væl at skapa álit
- Dugir at arbeiða sjálvstøðugt, og hevur góð samstarvsevni
- Trívist við at samstarva við skiftandi fakbólkar

**Høvuðsuppgávan í starvinum eru:**

- At veita ráðgeving og vegleiðing til starvsfólk og foreldur
- At kanna og viðgera børn við talitrupulleikum í og undir skúlaaldur
- At skipa fyri fyribyrgjandi tiltøkum innan talu og málmenning
- At menna sernámsfrøðiliga virksemið í dagstovnum og skúlum

**Førleikakrøv:**
Útbúgving sum audiologopedur, lærari ella námsfrøðingur við eftirútbúgving innan logopedi ella samsvarandi.

**Setanartreytir til starvið:**

Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Margreth Olsen, stjóra, á telefon 360 200 ella í teldubrævi til [margreth@sernam.fo](mailto:margreth@sernam.fo).

**Umsóknarfreist:**

Umsóknir við avriti av prógvum, CV og øðrum viðkomandi skjølum, skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi sunnudagin 18. oktober 2020 og skulu sendast til:

**Sernám**
**á Frælsinum**
**Postboks 2036**
**FO-110 Tórshavn**
**ella sum teldubræv til** [sernam@sernam.fo](mailto:sernam@sernam.fo)

Sernám veitir sernámsfrøðiliga ráðgeving, vegleiðing og stuðul, soleiðis at børn og ung (0-18 ár) kunnu styrkjast í menningini, sum umfatar sosiala, kropsliga, persónliga, málsliga og kognitiva menning.
Í løtuni er Sernám í eini broytingartilgongd, og tann, ið settur verður, má vera sinnaður at luttaka virkin í hesi tilgongd umframt tola broytingar í starvinum.